


# Meira ferð á – eisini í Suðuroynni

Val



HEÐIN MORTENSEN
valevni Javnaðarfloksins
www.hedinmortensen.com

**Ferð eftir ferð hava kanningar víst, at neyðugt er við avgerandi framburði í Suðuroynni, skal oynni vera lív lagað. Serfrøðingar hava gingið kropp á kroppi og víst á, at nú – og tað merkir altso nú – má gerast nakað, so fólkavøksturin ikki minkar, men nýggj arbeiðspláss verða skapt. Hetta kann ikki henda ov skjótt!**

Sum skilst, ganga allir teir stóru politisku flokkarnir inn fyri tí nógv umrøddu vakstraravtaluni fyri Suðuroynna, hóast synd er at siga, at nógv er víst í verki enn. Men ein semja kann sjálvandi brúkast og skal brúkast, tí tað er veruliga umráðandi, at meira ferð kemur á – ikki minst í Suðuroynni.

Skulu vit halda okkum til samhaldsfasta hugsunarháttin, so er ongantíð ov skjótt, at tær 50 milliónir krónurnar verða settar í grunnin, sum skal leggja botn undir vakstrarætlanina. Land og kommunur eiga í felag at lyfta, so Suðuroyggin – sum tann perla, hon er – kann gerast enn sjónskari á Føroyakortinum, tá vit tosa um virksemi, arbeiðspláss, vælferð og framburð.

Nógvar spennandi ætlanir eru longu í stoypiskeiðini, sum kunnu skunda undir, at nakað hendir. Her kann nevnast miðnámsskúlin, sum er í gerð, og ikki minst er umráðandi, at gongd eisini kemur á málið um Atlantic Adventure Eftirskúlan í Hvalba, sum kemur at hýsa 80 næmingum og skapar eina rúgvu av dynamikki við arbeiðsplássum, mentan, góðum ungdómsumhvørvi og øllum tí, ið eigur at fylgja við einum slíkum skúla.

At tað nú skal spyrjast so øgiligt kjak burturúr, hvør tekur undir við eftirskúlanum og ikki, skilji eg púrt einki av, tí her átti full semja at verið. Er nøkur ósemja, so má tað sigast at vera ein fabrikerað ósemja, sum botnar í ongum! Sjálvandi skulu vit hava eftirskúlan í Hvalba, og sum virkin partur í málinum, mestsum frá fyrsta degi av, kenni eg málið sera væl, og kann bara viðmæla, at arbeitt verður skjótari við tí á løgtingi og í landsstýri í komandi valskeiði, enn gjørt hevur verið higartil.

Eingin veit betur enn vit í Tórshavnar kommunu, at ein slíkur eftirskúli ikki bert kemur at gagna Suðuroynni, men øllum landinum. Fyri okkara part hava vit stóran tørv á hesum møguleika, so tá eftirskúlin kemur, fer okkara partur heldur ikki at liggja eftir, tí eg eri sannførdur um og veit, at tað ikki minst vera næmingar úr Havnini og Suðurstreymoy, ið fáa mikla gleði av hesum eyka skúlaárinum suðuri í Hvalba.

Umframt omanfyri nevndu mál, so stendur Suðuroyggin framman fyri einari hendingarríkari tíð, har millum annað spennandi ætlanin við gomlu saltsiloini á Drelnesi kann gerast eitt av avgerandi átøkunum. Eisini har havi eg verið so heppin at hava verið við, so tí kenni eg tað málið til fulnar og kann bert viðmæla, at tað frá øllum síðum fær fullan stuðul.

Sum nevnt, so er í tøkum tíma, at meira ferð verður sett á í Suðuroynni, og mín partur skal ikki liggja eftir. Við einari góðari vakstraravtalu fyri alla oynna, einum nýggjum miðnámsskúla, einum nýggjum eftirskúla og einum enn størri innsatsi á mentanarøkinum kunnu sanniliga standa ljósar tíðir fyri framman hjá Suðuroynni.

Tað krevur bara, at meira ferð verður sett á, og at arbeitt verður allan vegin, til komið er á mál. Hesum vil eg virka fyri, fái eg álit og verði valdur á ting.

# Føroyska vinnulívið má fjøltáttast

Val



KÁRI PETERSEN
Sjálvstýrisflokkurin

Flestu lond í framkomna heiminum eru rík, tí vinnulívið støðugt skapar nýggjar uppfinningar og ger verandi produkt betri. Føroyska vinnulívið og føroyska vælferðin eru harafturímóti í stóran mun grundað á náttúruríkidømi. Skulu Føroyar klára at fylgja við framkomna heiminum, mugu vit fáa vinnur, sum skapa nýggja vitan og nýggjar uppfinningar. Fáa vit fram tílíkar vinnur, so kunnu vit bæði fáa búskaparvøkstur og somuleiðis fáa nýggj arbeiðspláss, so tey sum hava tikið tað langar útbúgvingar í útlondum koma aftur til Føroyar.

**Fiskivinnan tryggjar ávíst inntøkustøði, men tryggjar ikki støðuga framgongd**

Føroyska samfelagið byggir sín ríkdóm á tann ávøkstur, sum er í føroyskum sjóøki á hvørjum ári. Náttúruríkidømið er nóg mikið at tryggja eitt ávíst inntøkustøði, men vera vit verandi í hesum tilfeingisbúskapi, so fara Føroyar longur og longur afturum grannar okkara, og fólkafráflytingin fer í gongd aftur.

**Vinnulív, sum skapar uppfinningar, skapa støðugan vøkstur**

Føroyar tørva nýggjar vinnur, sum ikki eru grundaðar á náttúrutilfeingi. Flestu av grannalondum okkara byggja sítt ríkidømi á, at vinnulív teirra skapar vitan og uppfinningar, sum eru nyttugar, og sum fólk vilja gjalda fyri. Henda støðuga skapan av nýggjum og betri vørum tryggjar eina støðugan vøkstur í virðisskapanini og framleiðsluni.

**Vitanargrundaðar vinnur brúka arbeiðsmegi við hægri útbúgvingum við tekniskari vitan**

Skulu vit fáa føroyingar heimaftur, sum hava tikið hægri útbúgving, so er neyðugt, at vit hava eitt vinnulív, sum krevur arbeiðsmegi við slíkum útbúgvingum. Fáa vit eitt vitanargrundað vinnulív, so fer hetta vinnulív í stóran mun at brúka fólk við hægri útbúgvingum. Føroyingar fara tí ikki longur at lesa seg av landinum sum í dag.

Bert við at menna nýggjar vinnur, ið brúka fólk við hægri útbúgvingum, kunnu vit rokna við at fáa føroyingar við longum útbúgvingum heimaftur.

**Nýggju vinnunar mugu byggja á fyrimunir í verandi vinnufyritøkum**

Fyri at nýggju vinnurnar skulu veksa fram, er í fyrsta lagi neyðugt at hava fólk við neyðugu útbúgvingunum. Í øðrum lagi mugu tær byggja á fyrimunir í verandi vinnulívi. Tvey øki, sum Føroyar hava eitt gott støði at byggja á, er innan kunningartøkni og innan ílegugengransking. Føroyar hava longu fyritøkur innan kunningartøkni, sum eru kappingarførar í altjóða høpi. Somuleiðis eru Føroyar við sínum lítla fólkatali og góðu skráseting av ættartalvum sera vælegnaðar at gera gransking í arvaeginleikum.

**Nógvur stuðul verður veittur til tiltøk, sum ikki geva nakran vøkstur**

Undanfarin landsstýri hava givið og geva framvegis nógvan stuðul til vinnulívið. Tíverri verður bert veittur stuðul til verandi vinnur, og eingin vøkstur stavar frá hesum stuðulstiltøkum.

**Sjálvstýrisflokkurin vil skapa grundarlag fyri nýggjum vinnum**

Sjálvstýrisflokkurin ynskir at styrkja útbúgvingartilboðini á fróðskaparsetrinum innan kunningartøkni. Harumframt ynskir sjálvstýrisflokkurin at fáa til vega eitt hóskandi infrakervi, sum kann gera tað léttari hjá fyritøkum at gera granskingarabeiði í arvaeginleikum í Føroyum. Somuleiðis ynskir sjálvstýrisflokkurin at økja granskingarjáttanina og veita íverksetarastuðul til nýggjar vinnur.

Sjálvstýrisflokkurin ásannar, at skulu Føroyar ikki gerast eftirbátur og missa ungfólkið av landinum, so er neyðugt, at vitanarvinnurnar verða mentar og gerast ein týðandi partur av føroyska búskapinum. Tí er neyðugt at velja ein sterkan sjálvstýrisflokk á ting 19. januar.

# Børnini eru framtíðin

Val



ANN ELISABETH JOENSEN
Valevni Javnaðarfloksins

Familjan er kjarnin í samfelagnum, og familjan skal hava tað gott. Hevur familjan tað gott, so hevur samfelagið tað gott.

Stakar mammur og stakir pápar hava ikki nóg góð kor í Føroyum. Hetta gongur út yvir alla familjuna – ikki minst børnini.

Ein virkin familjupolitikkur skal eisini tryggja støkum uppihaldarum góð kor.

Øllum børnum í Føroyum skal tryggjast ein góður uppvøkstur og grundleggjandi rættindi.

Øll børn skulu hava eina góða byrjan í lívinum. Tí er tað týdningarmikið, at familjan hevur ein tryggan grundvøll at byggja á.

Tað er týdningarmikið, at stovnar og skúlar rúma bæði teimum veiku og sterku børnunum, og at fólk við útbúgving eru um børnini.

Vit skulu hava ein virknan barna-og ungdómspolitikk soleiðis, at tey, ið varða av politisku skipanini altíð eru dagførd um, hvussu okkara børn hava tað í samfelagnum.

Tað er neyðugt at gera kanningar og hagtøl, sum lýsa umstøðurnar hjá okkara børnum, um tað skal eydnast at hjálpa og fyribyrgja nógvum av teimum trupulleikum, sum nógv børn hava at dragast við.

Javnaðarflokkurin vil, at øll skulu hava ein tryggan grundvøll at byggja á.

# Framá Føroyar

Val



HEÐIN ZACHARIASEN
Fólkaflokkurin

Sum valdur politikari seinastu 6 árini havi eg arbeitt fyri allar Føroyingar, og um eg verði valdur aftur 19. Januar komi eg eisini at halda fram við hesum arbeiði.

**Virka** fyri at vit hava ein sterkan og virðiligan høvuðsstað, sum vit allir Føroyingar kunnu gleðast um og eiga og vera stoltir av.

**Virka** fyri at vit hava sterkar kommunalar eindir, sum megna at umsita tær uppgávur, sum vera lagdar út til kommununar.

**Virka** fyri at okkara vinnulív fær sterkar og tryggar karmar at virka í, nú og í framtíðini, og á henda hátt menna samfelagið alt. Politikkur er at raðfesta, taka avgerðir, avgerðir sum byggja inn í framtíðina.

Góði veljari, set tín x við Heðin Zachariasen á lista A og fá eitt umboð, sum umboðar allar Føroyar.